Kappingarráðið

Skálatrøð 20 P.O.Box 73 FO-110 Tórshavn Føroyar
Tel +(298) 320 369 Fax +(298) 31 [illegible] e-mail: [illegible]

**Vinnumálastýrið**
**Postboks 377**
**FO-110 Tórshavn**

Att.: Maria Róin, deildarstjóri

Tórshavn 2000-09-29
Mál nr. 99K565-0002 - 1

**<u>Viðv. "norðurlendska sáttmálanum um sínámillum hjálp í kappingarmálum"</u>**

Í desember 1999 var almannakunngjørd ein frágreiðing frá norðurlendsku kappingarmyndugleikunum "Nordisk samarbejde på Konkurrenceområdet, rapport fra de nordiske konkurrencemyndigheder nr. 1, 1999". Í frágreiðingini verður viðgjørdur tørvurin á einum víðkaðum norðurlendskum samstarvi innan kappingareftirlit.

Kappingarráðið viðgjørdi í vár nevndu frágreiðing og metti at tað eisini fyri Føroyar hevur áhuga at víðka samstarvi mótvegis hinum norðurlondunum. Á fundi í Vinnumálastýrinum kunnaðu umboð fyri Kappingarráðið um tær ætlanir sum vóru fyri einum víðkaðum norðurlendskum samstarvi á kappingarøkinum.

10-11. mai 2000 var árligi várfundurin millum norðurlendsku kappingarmyndugleikarnar hildin í Føroyum. Her var spurningurin aftur viðgjørdur og arbeitt hevur síðani verið víðari við málinum seinastu mánaðirnar og semja tykist nú verða millum norðurlond um at fremja ein norðurlendskan sáttmála um sínámillum hjálp í kappingarmálum.

**Hvat snýr sáttmálin seg um ?**

Seinastu árini er føroyski búskapurin og føroyskt vinnulív vm. í størri og størri mun verið partur av altjóðagerini innan vinnu og búskap bæði innan handil, alivinnu, fiskivinnu oa. . Nú frálandavinna er farin í gongd eru útlit fyri at henda gongd tekur dik á seg í enn størri mun. Kappingarráðið metir, sæð í ljósinum av vinnuligu broytingunum innan flestu vinnugreinir, at týdningur av at verða partur í millumtjóða kappingarsamstarvi kann hava stóran týdning fyri at tryggja kapping og eina sunna kappingarjavnvág í millum tær fyritøkurnar, ið virka og fara at virka í Føroyum. Hartil kemur at Føroyar við sáttmálanum vísa fyri umheiminum at Føroyum hevur eina lógarskipan, ið tryggjar vinnu á einum gjøgnumskygdum grundarlagi.

Nútíðar búskaparliga skipanin er soleiðis at handil og vinna í alsamt størri mun ferð tvørur um landamørk. Hetta ger at fyritreytirnar fyri kappingareftirlíti broytast munandi. Londini í Evropa samstarva í stóran mun um hesi viðurskiftini. Nú er so ætlanin at hetta eisini skal gera seg galdandi í norðurlendskum høpi.

Høvuðsendamálið við kappingarlóggávu er m.a. at forða valdsmisnýtslu á marknaðinum, at ongin skal einsæris ella í felag, eftir eini nærri búskarparligari fatan, kunna misnýta sína støðu á einum marknaði soleiðis at aðrir kappingarneytar, endabrúkarar vm. verða stillaðir soleiðis at fyrimunirnir við marknaðinum verða avmarkaðir óneyðuga til ampa og skaða fyri onnur á marknaðinum.

Kappingarráðið

*Skálatrøð 20 P.O.Box 73 FO-110 Tórshavn Føroyar*
*Tel +(298) 320 369 Fax +(298) 31 60 67*

Við sáttmálanum fær Kappingarráðið møguleika at fara tvørtur um landamørk fyri at fáa upplýsingar um eitthvørt viðkomandi mál í samstarvi við kappingarmyndugleikan í landinum og øvugt. Hetta vil tó sjálvandi verða innan karmarnar av kappingarlóggávuni í hvørjum einstøkum landi.

**Fyrimunir við sáttmálanum ?**

Tað liggja stórir fyrimunir í, at Føroyar á sáttmálarættarligum grundarlagi gerast partur av norðurlendskum samstarvi innan kapping. Tað ber í størri mun til at tryggja endamálið við kappingarlógini og at vinna og samfelag fær enn greiðari og gjøgnumskygdari karmar at virka undir.

**Vansar**

Vansin er fyrst og fremst fyri tær fyritøkurnar, ið vilja misnýta sína marknaðarstøðu og har kappingarmyndugleikarnir onkurvegna gerast avmarkaðir av millumtjóða viðurskiftum.

Tað kann gerast neyðugt við størri játtan til Kappingarráðið, tó so at málini, ið Kappingarráðið tekur upp altíð verða raðfest í mun til umsitingarligu orkuna hjá stovninum, ið er játtað á fíggjarlógini.

Kappingarráðið vil tí mæla til at uppskoti til sáttmála verður sett í gildi fyri Føroyar og at Vinnumálastýrið tekur neyðugu stigini til at fremja tað. Kappingarráðið stendur til taks við ráðgeving o.ø. í hesum sambandi.

**Vegna Kappingarráðið**

Terje Sigurðsson
ráðsskrivari

/ Sigurð Ó. Vang
fulltrúi